## Portugal sosialistiskt

Hóast veljarakanningarnar upp undir tjóðartingsvalið í Portugal bendu á, at tað fór at verða rættiliga javnt millum ta sosialistisku stjórnina og ta borgarligu andstøðuna, vunnu sosialistarnir rættiliga trygt. Munurin bleiv sjey prosentstig. Sosialistaflokkurin hjá Jose Socrates, forsætisráðharra fekk 36,6 prosent av atkvøðunum, og hann kann nú velja ímillum at skipa stjórn saman við einum stuðulsflokki ella at skipa minnilutastjórn, skrivar Reuters. Hóast onkur av teimum borgarligu flokkunum hevði framgongd, eru teir ikki nóg væl mannaðir til at skipa stjórn.



## Bendir á írskt ja

Í Írlandi benda allar meiningakanningar á, at írar fara at atkvøða fyri Lissabon-sáttmálanum, tá fólkaatkvøða verður um spurningin síðst í vikuni. Í einari kanning, sum bleiv almannakunngjørd í gjár, søgdu 55 prosent, at tey fara at siga ja, 27 prosent fara at siga nei, og 18 prosent høvdu ikki tikið støðu enn. Ein kanning, sum blaðið Irish Times prentaði leygardagin, vísti, at 48 prosent ætla sær at atkvøða fyri, 33 prosent vóru ímóti, og 19 prosent vistu ikki. Tá írar vóru á fólkaatkvøðu um Lissabon-sáttmálan í juni í fjør, atkvøddu 53,4 prosent ímóti sáttmálanum, sum tí ikki er komin í gildi í ES enn.

# Yrkislistin letur dyrnar upp

**Installatiónir, høggmyndir og koparprent er bara nakað av tí, sum er at síggja frá nøkrum av okkara fremstu yrkislistafólkum á ársins Heystframsýning**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Sermerktu speglingarnar hjá Hjørdis Haack hava fingið eitt øðrvísi gerandisligt úttryk*



*Aftur ein óvanlig listarlig avbjóðing frá Brandi Paturssyni*

Hóast teirra umstøður neyvan altíð eru tær bestu, tykist føroyska yrkislistin at verða í støðugari menning. Tað ber ársins Heystframsýning á Skipasmiðjuni boð um, har vit í løtuni hava høvi at síggja nøkur av nýggjastu verkunum hjá einum stórum parti av føroysku yrkislistafólkunum.

### Byggja víðari

Hetta er fimta árið á rað, at flestu av teimum somu listafólkunum sýna fram á Heystframsýningini, og hjá teimum, ið hava fylgt við, er týðiligt, at fleiri av listafólkunum hava flutt seg nógv í áhaldandi leitanini eftir nýggjum útrykkum.

Eitt tað tað fyrsta, tú varnast á framsýningini, er stóra installatiónin hjá Brandur Paturssyni, sum fyllir stóran part av gólvvíddini. Á sín egna hátt tykjast tey trý verkini at spæla saman í onkrum slag av high-tech ævintýri, har lasarastrálur og viðarbular kasta kendar og ókendar týdningar inn í verkið.



*Nýggju koparprentini hjá Ankeri Mortensen tykjast agggomul og spildurnýggj í senn*

Eisini Tóroddur Poulsen roynir seg hesuferð við eini installatión, ið byggir víðari á verk, vit sóu í summar, har bomm og døtukustar vóru partur av tilfarinum. Kendu prentini hjá Tóroddi Poulsen hava eisini fingið nýggj úttryk, við at tey nú eru sett saman sum myndakollaga við gomlum familjumyndum.

Millum yngru listafólkini ger Tummas Jákup Thomsen vart við seg við eini myndarøð, sum er tað fyrsta, sum fangar eygað, tá tí kemur inn í Listahøllina. Stílurin er pop-art kendur, og onki er at mistaka seg í, at myndirnar eru sjálvsportrettir.

Av eldru listafólkunum, hevur Bárður Jákupsson hesuferð eina røð av vatnlitsmyndum við, sum tykjast at hava fingið eitt enn lættari flog yvir sær við ljósu heilt út í ljósareyðu litunum.

Við á Heystframsýningini í ár eru Andrias Andreassen, Hanni Bjartalíð, Hjördis Haack, Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Bárður Jákupsson, Anker Mortensen, Marius Olsen, Torbjørn Olsen, Bjarne Werner Sørensen, Tummas Jákup Thomsen. Hesi framsýna ikki í ár: Rannvá Kunoy, Olivur við Neyst og Tróndur Patursson.

Gestaframsýnararnir í ár eru Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir og Brandur Patursson, sum bæði vóru við seinasta ár, og Tóroddur Poulsen, ið er við á fyrsta sinni.

# Kósalagna heilt nær

**Eftir øllum at døma verður ikki leingi, til greiða fæst á, um Hanus Hansen megnar at finna fígging til Kósina í Klaksvík. Føroyagrunnurin og Norðoyagrunnurin hava fingið umsóknir til fígging, men enn hevur hvørgin grunnur tikið støðu. Tó verða umsóknirnar viðgjørdar skjótt**

VINNULÍV

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Føroyagrunnurin hevur gjørt sína skyldu í fiskivinnuni, og fer tí ikki at vera við til eina endurreisn av Kósini.

Hetta vóru boðini í novemburmánaði í fjør, eftir at Maru Seafood var farið í gjaldsteðg við virkinum.

Nú kundi meira enn so hent seg, at Føroyagrunnurin, sum hevur eitt av endamálunum at eiga pening í JFK, kúvendir í hesum máli.

Ein umsókn um fígging frá nevniliga JFK liggur nevniliga hjá nevndini um at vera við til at endurreisa Kósina, og hóast tað ikki ber til at røkka formanninum í grunninum, Leif Abrahamsen, í dag, so staðfesta aðrir limir í nevndini, at umsóknin viðvíkjandi Kósini, ikki hevur verið viðgjørd á fundi, og tí er ongin almenn støða tikin enn. Allir aðrir spurningar verða vendir til formannin í nevndini.

Norðoyagrunnurin hevur somuleiðis fingið eina umsókn, men heldur ikki har hevur fundur verið.

- Vit hava í seinasta lagi um tvær vikur viðgjørt umsóknina, og tástani tá fari eg at úttala meg um nakað, sigur Absalon í Buð, formaður í Norðoyagrunninum.

### Hanus tegir

Hanus Hansen heldur seg hava sagt ov nógv í samband við endurreisnina av Kósini í Kringvarpinum í seinastu viku, og vil nú lítið siga, hóast tað eftir øllum at døma bara verða nakrar fáar vikur til Kósin letur upp.

Tó sigur hann, at frá tí, at avtalurnar koma upp á pláss og til Kósin letur upp varða einar tvær vikur. Somuleiðis staðfestir Hanus Hansen, at tað bæði kann vera í morgin og í næstu viku, at hann veruliga veit nær ætlanin verður veruleiki.

Hinvegin er onki vist við fíggingini, tí hvørki Norðoyagrunnur ella Føroyagrunnur hava viðgjørt umsóknirnar á fundi. Og tí er ikki endaliga vist, um hesir vilja spæla við.

### Rávøra verður

Sum skilst fer rávøra ikki at tróta, tí bæði parið, sum P/F Christian í Grótinum hjá Kristian Martin Rasmussen keypti og parið sum felagið hjá Tummas Christophersen keypti fara at avreiða til Kósina, um ella tá hon byrjar sítt virksemi aftur.

Men enn ber ikki til at siga nakað við vissu viðvíkjandi virkseminum hjá Kósini í Klaksvík, men tað er vist, at Hanus Hansen saman við øðrum roynir og er komin fitt ávegis at finna fígging til eina endurreisn av Kósini.